# Elektromekanikari til Pf. Eyðun Jespersen

Søkt verður eftir elektromekanikarum, at byrja skjótast gjørligt.



**Høvuðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um nýgerð og umvæling av elektromekaniskum skipanum, so sum generator-anleggum, pumpum, elmotorum, elstýringum, køliútgerð v.m.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum at tú hevur útbúgving sum elektromekanikari, maskinmeistari, elektrikari ella líknandi. Royndir innan hetta økið er avgjørt ein fyrimunur. Vit leggja dent á góð samstarvsevni, og at tú ert arbeiðssamur og megnar at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði. Pf. Eyðun Jespersen hevur umleið 10 fólk í starvi sum er, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum og fær harvið gott innlit í nógv viðurskifti.

Virksemið hjá Pf. Eyðun Jespersen er fjølbroytt innan handil, handverk og ídnað. Tað umfatar m.a. ein elektromekaniskan verkstað, góðkendar kølimontørar og elinnleggjara, sølu av útgerð og tænastum til alivinnuna og søla av ymiskum el-tilfari.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning, og løn í mun til útbúgving og royndir.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Róa Vang (rv@ej.fo) á telefon 314547 ella 233300

**Umsókn**
saman við upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera P/F Eyðun Jespersen, Stiðjagøta 4, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. september 2007.

P/F EYÐUN JESPERSEN

Pf. Eyðun Jespersen Stiðjagøta 4 FO-100 Tórshavn

## VENJINGARSKÚLIN

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv frá 1. september 2007 og skúlaárið út fyri lærarar við niðursettari tíð.

Skúlin hevur brúk fyri lærara, sum kann undirvísa í 1. – 3. flokki og í ítrótti, sum hevur góð samstarvsevni, er opin, kreativur, vil vera við til at menna skúlan, átaka sær starvið sum flokslærari, og sum er sinnaður at arbeiða í sjálvstýrandi toymi!

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við skúlastjóran, Petur Ova Petersen á tlf. 302570 ella 213502.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **mikudagin 23. august á middegi.**

*Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 450 næmingar í 19 flokkum og her koma at starvast 37 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi : 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8.-10. fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum : 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.*

**Venjingarskúlin**
handan Á 14
FO-100 Tórshavn

## Starvsfólk søkist

Starvsfólk til **Pizza+** søkist at byrja beinanvegin.

**Áhugað kunnu ringja tlf. 28 45 45**

Lesið **Sosialin** - so eru tit við

## Lærugreinaráðgevar

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. oktober 2007 ella skjótast gjørligt eftir hetta.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um lærugreinarnar **enskt, týskt, landalæru, søgu og samtíð.** Tilsamans 12 lønartímar um vikuna eru at søkja. Ein lønartími er umleið 1,6 fyrisitingartími.

**Starvslýsing**
Starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt, at ráðgevin skal:

- virka fyri einari fakligari, námsligari og tøkniligari menning í skúlanum
- ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum
- ráðgeva í sambandi við skeið og eftirútbúgving.

Lagt verður upp til skipað samstarv millum ráðgevarnar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjari

- hevur hollan ástøðiligan kunnleika og góðar starvsligar royndir
- hevur áhuga fyri námsfrøðiligum arbeiði og fyri nýtslu av KT í undirvísingarhøpi
- hevur góð samstarvsevni og evni at samskipa
- hevur førleika at menna samstarvið við starvsfelagar, stovnar og lærarar
- verður ein virkin partur av toymisumhvørvinum í Landsmiðstøðini og samstundis kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**

- eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti við lærarar, skúlar og skúlamyndugleikar
- arbeiði á einum høgum fakligum stigi og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og lønt í lønarflokki 30.3.

Setanartíðin er í fyrstu atløgu 3 ár, har fyrsta árið er eitt royndarár. Síðani kann setanartíðin verða longd. Um serlig viðurskifti tala fyri hesum, kann setanartíðin leingjast út yvir 7 ár.

Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v., o.ø. skulu sendast til:
**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
ella t-post: lms@lms.fo
Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 27. august 2007**.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

**www.lms.fo**

Landsmiðstøðin

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.